# Á Jarnbardi eru tær sera væl fyri

***6–mannafør kvinnur:** Hóast sigurin var sannførandi, so rokna tær á Jarnbardi við og vóna, at tær fara at fáa stóra kapping frá hinum manningunum*

Eftir venjingina mánakvøldið vóru tær á Jarnbardi og sóu sjónvarpsupptøkuna av róðrinum, sum tær luttóku í leygardagin. Tá kundu tær við egnum eygum staðfesta, at tær vunnu ein sera rudduligan sigur. Soleiðis sum róðurin myndaðist er ilt at fá eyga á, hvør skal hótta FM vinnararnar í fjør og í 1998, Jarnbard:

– Hesa ferð gekk sera væl. Vit komu eina hálva bátslongd framum hinar bátarnar longu í startspurtinum, og tað er altíð lættari at rógva, tá tú er frammanfyri hinar, enn tað er at rógva, tá tú skalt stríðast fyri at fáa fatur á teimum, sum eru frammanfyri.

Hetta sigur Rannvá Ingvarsson. Hon er bátsformaður umborð á Jarnbardi. Manningin umborð á Jarnbardi er mest sum tann sama sum í fjør. Tær hava fingið eina nýggja umborð, men hon hevur áður róð við 5–mannaførum.

Tá vit spyrja, um móttøkan var stór, sum tær fingu, tá vinnarabáturin kom aftur til Havnar, heldur bátsformaðurin, at tað kann ikki sammetast við tað, hon áður hevur upplivað:

– Eg róði í 1991 og í 1992 við Hvassa á Oyri. Tá vunnu vit onkra ferðina, og tá var øll bygdin og tók ímóti okkum, tá vit komu aftur. Í Havnini eru fleiri róðrarfeløg og nógvir bátar, so tað verður ikki heilt tað sama.

Jarnbardur vann í fjør allar róðrarnar, og við róðrinum leygardagin í huga er tað upplagt at spyrja formannin á Jarnbardi, um hon heldur, at tær aftur í ár fara at vinna hvørja ferð:

– Tað fært tú meg ikki at siga. Eg vóni, at vit fara at fáa harða kapping, og eg rokni eisini við, at bæði Hvessingur, sum ikki fekk so góðan start á norðoyarstevnu, og nýggi báturin Gongurólvur fara at kappast við okkum. Tað skuldi heldur ikki undra, um onkur av hinum bátunum eisini fer at standa seg betri, heldur Rannvá Ingvarsson.



*Tær á Jarnbardi bara halda á fram at vinna. Sum tað framgongur av myndini, so var eingin ivi um úrslitið í Klaksvík*
***Mynd: Jonhard Hammer***

### Vant alla tíðina

Tær umborð á Jarnsbardi hava ikki hildið nógv frí frá kappróðri, síðani tær vunnu á ólvasøku í fjør:

– Í September fóru vit so smátt at fyrireika okkum til ferðina niður til Scillyoyggjarnar. Vit vandu kondition og styrkisvenjing í allan vetur. Fyrst í hesum árinum fóru vit at venja í giggini. Fyrst í mai fóru vit umborð á Jarnbard, so vit eru væl fyri, sigur formaðurin umborð á Jarnbardi.

Umborð á hinum bátunum hava tær sjálvandi ikki vant so nógv. Tí kann tað kanska hugsast, at munurin frá Jarnbardi og aftur til teir næstu ikki fer at verða so stórur næstu stevnurnar, sum hann var á norðoyarstevnu. Men tað er einki at ivast í, at tær umborð á FM bátinum frá í fjør fara at vera sera drúgvar.

jh

# Vágagentur tóku alt

***5–mannafør gentur:** Báðir bátarnir úr Miðvági vóru fremstir, og tann úr Sandavági endaði á triðja plássi*



*Gentumanningarnar á báðum miðvágsbátunum, Frúnni og Beintu, tóku sær av teimum báðum fremstu plássunum á Norðoyastevnu*
***Mynd:Jan Müller***

Tað er ein øgiligur hugur hjá gentunum í Vágum at taka lut í kappróðri. Á norðoyarstevnu var størsta kappingin tann millum 5–mannafør við gentumanning. Seytjan bátar vóru við í róðrinum, og ikki færri enn fimm manningar komu úr Vágum.

Vágabátarnir gjørdu rættuliga um seg. Nýggi báturin í Miðvági, Frúgvin, vann, og Beinta úr Miðvági gjørdist næstfremst.

Kappingin stóð bara um næstfremsta plássið. Beinta var drúgvast í tí kappingini, men Ørnin úr Sandavági gav Beintu ein skarpan gang.

Um fyrsta plássið var eingin kapping seinnapartin av eitt túsund metra teininum. Frúgvin var leys av hinum bátunum, tá tær vóru komnar inn á hálva Kósabrúnna, og á málinum vóru tær so langt frammanfyri hinar bátarnar, at tað bara kann sammetast við fleiri at sigrunum, sum teir umborð á Eysturoyingi vunnu í fjør og í fyrraárið.

### FS Vágar

So nógv fólk vóru og tóku ímóti kappróðrarbátunum í Miðvági, sum tað ongantíð áður hava verið, sigur Pernille Krogh, sum er bátsformaður umborð á vinnarabátinum.

Ørnin, sum undanfarnu árini hevur vunnið so nógv, fór til Sandavágs, men Miðvágur eigur eitt sindur av manningini umborð á Ørnini, og tað er ikki frítt, at tey í Sandavági eiga eitt sindur umborð á bátunum úr Miðvági:

– Umborð á Ørnini er róðursmaðurin tann sami, meðan allar tær, sum rógva, eru nýggjar. Vit eru tríggjar, sum áður hava róð við Ørnini, tvær hava róð við Súluni og tvær hava áður róð við Lómi av Argjum, sigur bátsformaðurin á Frúnni. Seks okkara búgva í Miðvági, og ein býr í Sandavági.

Miðalaldurin umborð á Frúnni er umleið tjúgu ár. Tann elsta er 27, men fleiri av hinum eru 17–18 ára gamlar.

Umborð á Beintu er róðursmaðurin 20 ára gomul, ein er 19 ára gomul, og hinar eru 16–17 ára gamlar. Fýra eru úr Sandavági, og tríggjar eru úr Miðvági. Fýra av teimum umborð á Beintu hava verið við í eitt ár, og tríggjar eru komnar umborð í ár. Bátsformaður er Ragnhild Olsen:

– Sørvágsbátarnir venja nú eisini í Miðvági. Vit venja ofta í senn, men higartil hava vit ikki róð móti hvørjum øðrum undir venjing. Okkara kapping er fyrst og fremst við Ørnina. Frúnna tykist tað vera torført at gera nakað við. Tær umborð á Ørnini hava spælt hondbólt í vetur, so tær hava ikki vant so nógv sum vit. Tí rokni eg við, at tær far at verða drúgvar seinni í summar.

JH

---

# Yngd

Nr. 20 2000 SOSIALURIN

## YNGD HESAFER›

Iron Maiden




Allir finalistarnir funnir




Síða 15 Hedemølle efterskole

Síða 18 Stubbar

Síða 19 Hitlistar og fløgukapping

Baksíðan Fløguumæli